Talvið hesa vikuna

IM John Rødgaard (2274) — Martin Poulsen (2271) FM 2004 á Toftum (6. umfar)

1.Rif3 Rif6 2.c4 c5 3.Ric3 d5 4.cxd5 Rixd5 5.d4 Rixc3 6.bxc3 g6 7.e3 Bg7 8.Be2 0—0 9.0—0 Rid7 10.Bb2 Fc7 11.Fb3 e6 12.a4 (Hvítur hevði fingið góða støðu við at leika fyrst 12. e4 og síðani víðari til e5 fyri at byrgja svarta bispin inni) 12...b6 13.Rfd1 Bb7 14.c4 Rac8 15.a5 (Betri var at leika 15.d5. Nú verður hvíta c-finnan nakað veik) 15...Bxf3 16.axb6 Rixb6 17.gxf3 cxd4 18.Bxd4 Bxd4 19.Rxd4 Fe7 (Svartur hevur ongar stórvegis trupulleikar, og støðan er nøkunlunda jøvn. Hetta metur telduforritið Fritz 7) 20.Fa3 Fg5+ 21.Rg4 Ff5 22.Fd3? (Í roynd og veru fyrsti feilur. Fc3 við ætlanini Ra5 var neyðugt) 22...Fxd3 23.Bxd3 Rfd8 24.Bf1 Rc7 25.Rd4 Rdc8 26.Rd2 Rixc4 (Martin velur at fara út í eitt rókaendatalv við einum minimalum fyrimuni. Havast skal í huga, at tíðarneyðin var byrjað) 27.Bxc4 Rxc4 28.Rxa7 R8c5! 29.f4 (Støðan tykist jøvn, men svartur hevur tó onkrir møguleik- ar. Martin fer nú eftir sigrinum við næsta leikinum)

Støðumynd eftir 29.f4

29...g5! 30.Rd8+ Kg7 31.Rdd7 Rf5 32.fxg5 Rc1+ 33.Kg2 Rc2 34.Rd4? (h4 var ein betri roynd, ið møguleiki heldur remis) 34...Rfxf2+ 35.Kg3 Rg2+ 36.Kf3 Rcf2+ 37.Ke4 Rxg5 (Svartur hevur vinnandi fyrimun, og hvítur kann bert vóna, at svartur leikar skeivt. Men Martin er náðileysur) 38.h4 Rg4+ 39.Kd3 Rxd4+ 40.exd4 Rf4 41.Ke3 Rxh4 42.Rd7 Rh5 43.Ke4 Rf5 (Hvíti kongurin sleppur nú ikki yvir um f-linjuna, og svarta h-finnan sleppur tí á mál) 44.d5 Rxd5 45.Rxd5 exd5+ 46.Kxd5 Kg6 0—1

Tá Martin koppaði Rødgaard

Føroyameistarin Martin Poulsen telvaði við varsemi í FM og leikti tí fleiri skjótar javnleikir heldur enn at risikera. Tó fór hann kompromileyst eftir sigrinum ímóti John Rødgaard í 6. umfari.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

6. umfar bleiv eitt avgerandi umfar í landsliðsbólkinum; Martin vann seg av álvara upp í toppin við týðandi sigri, meðan Rødgaard leikti síni trý seinastu talv jøvn og misti harvið kontaktina við oddamenn-irnar Hans Kristian Simonsen og Martin Poulsen. Eisini byrjaði Olaf Berg at vísa tenn og bardi seg loksins framum Rødgaard í seinasta umfarinum.

Tolin trívst

Ein kann sanniliga siga, at Martin hevði tol frá fyrsta til seinasta bríksl. Hann var í fleiri talvum frá byrjan nøgdir við javnleik, og hevði eina greiða strategi; ikki at tapa nakað talv. Sjálvsagt vil eingin tapa eitt talv, men telvarar vita, at fert tú kompromileyst eftir sigri í hvørjum talvi, risikerar tú samstundis alt stigið. Tann kompromileysi stílurin er áskoðaravinarligur, men loysir seg ikki altíð.

Martin helt sína strategi alla kappingina, og tað er væl klárað av einum so ungum telvara. Føroyameistarin seinastu tvey árini valdi í røkum tíma at leggja varsemi frá sær eitt bil, tá hann við svarta fólkinum legði trýst á Rødgaard. Tolsemi fyrstu fimm umførini (1 sigur og 4 remis) loysti seg.

Longu aftur í 7. umfari valdi Martin aftur varsema stílin, tá hann eftir tíggju leikum við hvíta fólkinum bjóðaði mær javnleik. Eg takkaði ja.

Martin kom út í vandasjógv ímóti Torkil Nielsen í 8. umfari. Torkil leikti seg til vinnandi støðu við sínari hollendsku byrjan, men við eitt vendist rákið og Martin vann talvið. Eisini talvið í seinasta umfarinum hjá Martini varð víðopið; Rani Nolsøe - sum miðskeiðis í talvinum ikki tók av remistilboði Martins - legði trýst á Martin, men havnarmaðurin vardi seg væl og vann við sínum kontraálopið.

Harvið eisini føroyameistaraskapin annað árið á rað.

Hattrick?

Bert Luitjen Apol og Heini Olsen hava vunnið FM tríggjar reisir á rað; ávíkavist í 1974-75-76 og 1991-92-93. Martin ætlar sær sigandi eftir hattrikkinum komandi ár.

Í løtuni eru Martin og Hans Kristian í Dubai og luttaka í einari krútisterkari kapping við 45 stórmeisturum. Kappingin er í døgunum 18-28. apríl.

Bólkur 3:

HB fekk hevnd

Vágbingar vórðu sendir suðuraftur við tennis-eggið, tá HB tryggjaði sær oddasessin í bólkinum, og á Eiði fekk EB/Streymur í evstu løtu forloysandi málið, sum sendi teir í fjórðingsfinaluna

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað var skjótt staðfest í Gundadali, at HB og VB als ikki vóru sinnaði at taka sær av løtum í seinna dystinum teirra millum. Ein málleysur javnleikur tóktist annars sum eitt hampuliga upplagt úrslit, sum hevði givið báðum pørtum heimavøll í fjórðingsfinaluni, men tað var ikki liðin stórt meira enn ein minuttur, áðrenn hol varð sett á. Heini Fernandez fekk bóltin stungnan inn um VB-verjuna, og so sveik garvaði málrevurin ikki.

Skjóta málið var helst jústt tað, sum skuldi til hjá HB, tí komandi 89 minuttirnar nýttu teir til at sýna sítt besta avrik higartil í ár, tó at hetta var upp á eina hampuliga bíliga bakgrund.

VB megnaði nevnliga als ikki at fylgja spælinum hjá HB. serstakliga á miðvøllinum hevðu teir ilt við at fáa tak á. Ikki minst takka verið stórspælinum frá Kára Nielsen.

Kári var eisini maðurin, sum økti til 2-0, tá eitt gott og flatt langskot frá honum stikláði á vøllinum beint framman fyri Bjarna Johansen.

Og tá so VB stutt eftir hetta misti Dan Djurhuus, tá hesin hevndi seg inn á Røgva Jacobsen, var at kalla leyst og liðugt hjá HB. VB royndi kanska at sprella eitt sindur, og eitt nú hevði Palli Augustinussen eitt brakandi skot á stongina, men tá Heðin á Lakjuni beint undan steðginum økti til 3-0, var ikki meira eftir.

Og tó at HB í stóran mun tók sær av løttum eftir steðgin, so megnaðu teir tríggjar ferðir at økja. Og tað mundi kennast hugaligt, at tað fyri tað nógva vóru teir ungu menninir, sum nú settu dagsskránna. Seinastu løtuna var tað soleiðis Hallur Danielsen, sum var elsti HB'arin á vøllinum, og hjá mongu HB-viðhaldsfólkunum mundi tað kennast hugagott, at unga menninir áhaldandi koyrdu á troyttu vágbingarnar.

Soleiðis varð tað HB, sum fekk fyrimunin av heimavølli í fjórðingsfinaluni, og her hitta teir tann einaferð EB/Streym.

Leingi var annars líkt til, at felagsliðið ikki skuldi koma víðari, tí eftir at Jonhard Frederiksberg hevði lagt gestirnar av Skála framum, hevði Skála eisini møguleika at økja um leiðsluna, men teir vóru ikki nóg kaldir í avgerandi løtunum.

Og ístaðin kundi EB/Streymur so koppa øllum á høvdið seinastu 20 minutt-irnar. Sorin Anghel javnaði, tá hann megnaði at renna Skála-verjuna av sær, og í seinastu løtu kundi Fróði Clementsen so við sínum fyrsta máli fyri felagið tryggja EB/Streymi sigurin. Við frísparki langaði hann bóltin í netið, og so máttu Skála bara enn einaferð staðfesta, at tað er ikki nóg mikið at spæla góðan fótbólt stóran part av tíðini. Mál skulu til, og tá hesi eru skotin ræður so eisini um at halda tætt í egnari verju. Tey bæði týðningarmiklu kynstrini tykist Skála enn ikki hava lært.

HB-VB 6-0 (3-0)
1-0: Heine Fernandez
2-0: Kári Nielsen
3-0: Heðin á Lakjuni
4-0: Hendrik Rubeksen
5-0: Heðin á Lakjuni
6-0: Hendrik Rubeksen

EB/Streymur-Skála 2-1 (0-0)
0-1: Jonhard Frederiksberg
1-1: Sorin Anghel
2-1: Fróði Clementsen

Bólkur 1:

Tvey hat-trick við Løkin

Klaksvíkingar megnaðu ikki at halda fast um leiðsluna í Gundadali, og í Runavík hevði NSÍ ikki stórvegis trupulleikar við at staðfesta seg sum besti trý'arin

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Klaksvíkingar komu til Havnar eftir sigrinum leygardagin. Ikki minst tí teir undan sínari uppgerð høvdu sæð vágbingar fingið bank, og tí kundi KÍ við einum sigri gerast besti tveyr'arin í bólkaspælinum, og á tann hátt fáa rætt til heimavøll í fjórðingsfinaluni.

KÍ hevði møguleikan

B36 hevði hinvegin einki at spæla fyri, og við John Petersen sitandi uttanfyri vøllin var eisini undan dystinum greitt, at álopsspælið hjá árstalsfelagnum fór at verða skert.

Fyrra hálvleik tóktist tað eisini, sum ansaðu báðir partar serliga væl eftir, at teir ikki lupu framav. Tað nógva av spælinum gekk fyri seg á miðvøllinum, har hvørgin parturin hevði hegni ella neyvleikan at fáa veruligt tamarhald á, og sum heild var talan um ein av teimum heldur keðiligu dystunum hjá áskoðaranum.

Í seinna hálvleiki kom tó eitt sindur av lívi í. Ikki minst eftir at tað eydnaðist Atla Danielsen at leggja gestirnar framum, tá einir 20 minuttir vóru farnir av hálvleikinum. Klaksvíkingarnir vistu tó, hvussu leikur var farin í Fuglafirði, og tí høvdu teir tørv á enn einum máli, um heimavøllurin skuldi tryggjast, men tað eydnaðist teimum so ikki.

Ístaðin var tað Ronnie Samuelsen, sum við einum vøkrum máli javnaði fyri heimaliðið, soleiðis at eisini seinni dysturin millum liðini bæði endaði við javnleiki. Ein javnleiki, ið bæði sum so kunnu vera nøgd um, men hjá KÍ merkti tað so, at teir skulu royna seg á útivølli móti ÍF í fjórðingsfinaluni.

Gert og Helgi í hopla

Seinni dysturin í hesum bólkinum var tann í Runavík, har NSÍ við sigri á FS Vágum kundi vissa sær sætið í fjórðingsfinaluni.

Og hetta eydnaðist eisini við maner. NSÍ vann dystin ikki minni enn 6-2, og ikki minst mundi tað vera gleðiligt hjá liðnum at staðfesta, at bæði Gert Langgard og Helgi L. Petersen gjørdu hat-trick. Gert fekk tvey av sínum málum undan steðginum, tá NSÍ fekk trý mál, og tó at gestirnir soleiðis stóðu seg betri eftir steðgin, so var tað ongantíð nóg mikið til veruliga at hótta heimasigurin.

Runavíkingar gjørdu bart, tá teir á heimavølli eisini fingu fult í næsta dysinum móti FS Vágum
Mynd: Jonhard Hammer

NSÍ - FSV 6-2 (3-0)
1-0 Gert Langaard
2-0 Gert Langaard
3-0 Helgi L. Petersen
3-1 Birgir Joensen
4-1 Helgi L. Petersen
5-1 Gert Langaard
6-1 Helgi L. Petersen
6-2 Eyðfinn Fjallsbak

B36-KÍ 1-1 (0-0)
0-1: Atli Danielsen
1-1: Ronnie Samuelsen

Bólkur 2:

ÍF tók seinasta heimavøllin

Við stórsigri á TB gjørdu fuglfirðingar sína skyldu, og við sigri á Svangaskarði fekk GÍ sum einasta liðið fult stigatal

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hóast toftamenn høvdu bóltin nógv, so gav hetta sjáldan GÍ-verjuni nakrar sum helst trupulleikar
Mynd: Jonhard Hammer

Fuglfirðingar høvdu møguleika at ogna sær sessin, sum bara heimavøll í fjórðingsfinalunum við sær, men fyri at hetta skuldi eydnast, skuldu tvinnir lutir passa saman.

Fyrst og fremst, so mátti dysturin í Havn millum HB og VB ikki enda við javnleiki, og hartil skuldu fuglfirðingarnir so vinna ein so trivaligan sigur sum gjørligt. Og helst somikið trivaligan, at hóast KÍ skuldi vunnið í Havn á B36, so skuldu fuglfirðingarnir hava betra málmunin.

Einvegis

Og hetta riggaði eisini alt samalt hjá ÍF. At ósigurin hjá VB í Havn gjørdist somikið trivaligur, betraði sjálvandi um fortreytirnar, men sigurin hjá ÍF var av slíkum slag, at teir av álvara bøttu um málmunin.

Gamanið eydnaðist TB at javna, eftir at Magni á Lakjuni hevði lagt fuglfirðingarnar framum, men síðani gekk bara ein veg. Álopini skoluðu oman móti TB-málinum, og ikki færri enn átta ferðir eydnaðist heimaliðnum at fáa úrtøku úr hesum.

Móti endanum fekk TB pyntað nakað um, men úrslitið staðfesti enn einaferð, at fuglfirðingar so sanniliga ætla at gera um seg í ár. Spurningurin er so, hvørt spruttandi stríðsviljin og spæligleðin, sum ofta eyðkennir ein uppflytara fyrstu tíðina, eisini fer at standa við, tá farið verður undir landskappingina.

Toftamenn úti

Á Toftum plagar GÍ vanliga at standa seg væl, men fyri tað nógva var líkt til, at teir skuldu hava tað ógvuliga trupult leygardagin.

Hóast spælið í dystinum sum so ikki var nakað at reypa av, so vóru tað aloftast toftamenn, sum dugdu betri at stýra leðurkúluni, men mál spurdust tó ikki burturúr. Aloftast varð talan um ov nógv trillarí og ov lítið beinleiðis spæl, og tí kom verjan hjá GÍ sjáldan í nakrar trupulleikar.

Alt bendi á ein málleysan javnleik, og spentu heimaáskoðararnir høvdu helst langt síðani roknað út, at helt hetta saman við javnleikinum á Mølini, so kom B68 hóast alt víðari. Men seinastu løtuna snaraði alt tó skeiva vegin. Í einum skjótálopi eydnaðist GÍ at yvirspæla B68-verjuna, soleiðis at Krzystof Popczynski gjørdist leysur, og hann sveik ikki, nú hann fekk møguleikan at geva átjanda av 18 møguligum stigum.

Og tá EB/Streymur so í evstu løtu vissaði sær sigurin í dystinum móti Skála, fór øll vónin hjá B68. Nú skuldu teir ikki bara javna, men skora tvær ferðir fyri at koma víðari, og nær hesum komu teir ongantíð seinastu lítlu løtuna.

Tað tykist eftir bólkaspælið, sum hevur B68 enn ikki funnið røttu javnvágina á liðnum eftir dyggu frágongdina í fjør, og tó at toftamenninir altofast eru seigligir, so hava úrslitini í steypakappingini ikki sannført nakran um, at teir skulu miðja ovarliga á talvuni í ár.

Gøtumenn tykjast hinvegin vera væl fyri. Í vetur hava annars nógv suff verið at hoyra úr Gøtu, har tey siga seg hava ov lítið av fólki, men higartil hevur úrtøkan so verið 100%. Spælið hevur hinvegin ikki verið so heilt flótandi, men megna teir eisini at skava stigini saman í landskappingini, so munnu tey ikki vera so nógv, sum leggja í listarliga partin av avrikunum.

B68-GÍ 0-1 (0-0)
0-1 Krzystof Popzcyinski

ÍF-TB 8-3
1-0 Magni á Lakjuni
1-1 Hallur Christiansen
2-1 Bartal Eliasen
3-1 Hanus Eliasen
4-1 Eyðálvur Petersen
5-1 Bartal Eliasen
6-1 Magni á Lakjuni
7-1 Bartal Eliasen
7-2 Bárður Dimon
8-2 Høgni á Lakjuni
8-3 Olivur Abrahamsen